## Fluttu úr 47 londum til Føroya

Íbúgvatalið í Føroyum vaks við 261 persónum fyrstu átta mánaðirnar í ár. Vøksturin er burðaravlopið, ið var 196 og nettotilflytingin, sum var 65 persónar. Íbúgvatalið 31. august 2008 var 48.658. Fyrstu átta mánaðirnarí ár fluttu 1.126 persónar til Føroyar úr 47 londum. Størsti parturin, 799 persónar, fluttu til Føroya úr Danmark. 327 persónar fluttu til Føroya úr øðrum londum enn Danmark. 1.061 persónar fluttu úr Føroyum til 32 lond. Størsti parturin, 894 persónar, fluttu úr Føroyum til Danmarkar. 167 persónar fluttu úr Føroyum til onnur lond enn Danmark.

*Sí flyting til og úr Føroyum á www.hagstovan.fo*

## Javnaðarflokkurin í Klaksvík gjørt lista

Verðandi býráðslimir stilla uppaftur fyri Javnaðarflokkin í Klaksvíkar kommunu. Sjey fólk eru á listanum. Valevnini hjá Javnaðarflokkinum til kommunuvalið í Klaksvík eru hesi: Signhild V. Joensen, Ragnar Joensen, Tummas J. Lervig, Jákup Mikkelsen, Sigrid Mikkelsen, Søren Olsen, Eyðgunn Samuelsen.

# Taka fegnir ímóti føroyingum í Ålborg

**Flestu føroyingar, ið fara uttanlands at lesa hægri lestur fara til Keypmannahavnar í hesum ørindum. Nógvir aðrir møguleikar eru kortini fyri lesnaði á danskari jørð, og hesa vitanina ynskja tey á lærda háskúlanum í Ålborg nú at gera vart við á FAROEXPO í Runavík. – Vit hava longu fleiri føroysk lesandi her hjá okkum. Men vit vildu fegin havt nøkur fleiri, sigur verkætlanarleiðarin Hans Jørgen Brodersen úr Ålborg**

LESTUR
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*



*- Vit vilja fegin hava fleiri føroyingar at lesa í Ålborg, sigur Hans Jørgen Brodersen, prosjektleiðari. Í dag er Ålborg kendur sum lestrarbýur burturav*




*Bæði føroyingar og útlendingar taka lut á FAROEXPO. Fundir eru alla tíðina, har roynt verður at tosa seg til sættis um einhvørja avtalu*

**Runavík/Ålborg:** Tað kann tykjast sum langur vegur úr Føroyum til fjórstørsta býin í Danmark.

Fyri Hans Jørgen Brodersen er ikki talan um langan veg, um ein ungdómur hugsar um at fáa sær eina útbúgving á hægri stigi.

Frá at hava verið ein býur sum á mangar mátar var kendur fyri sítt skipasmíð, er eingin ivi í dag um, at býurin í dag er ein lestrarbýur burturav.

Hesum veruleika vita nógvir føroyingar longu av, men fyri verkætlanarleiðarin á lærda háskúlanum er fáa enn fleiri føroyingar hagar at lesa.

- Í dag eru omanfyri 14.000 lesandi í Ålborg, teirra millum nógvir føroyingar. Her hjá okkum finst ein breið vifta av útbúgvingum, sum eisini eru hóskandi fyri tykkara unga fólk, sigur Hans Jørgen Brodersen í stuttum viðtali við Sosialin.

Bæði útlendskar og føroyskar fyritøkur eru á stóru stevnuni, sum verður hildin í ítróttarhøllini í Runavík. Sosialurin hevur eisini sín bás á stevnuni.

### Føroyskur áhugi

Eitt er sjálvandi at hava ein lærdan háskúla í so stórum býi. Annað er, hvat hesin skúlin og mangir aðrir hava at bjóða teim lesandi.

Júst her kann lærdi háskúlin gerast svarið uppá undirvísingarætlanirnar hjá nógvum føroyingum í framtíðini. Her er eisini talan um útbúgvingar, sum føroyingar sjálvir fara at kunna gera nyttu av í framtíðini.

Sjálvur er Hans Jørgen Brodersen verkfrøðingur, og hann er tí vitandi um nógv viðurskifti, sum hava áhuga hjá teimum, ið ynskja at fara undir ein lestur av slíkum slagi ella stigi.

Eitt av teimum meiri spennandi evnunum á skúlunum er deildin, ið fæst við orku og orkumøguleikar í framtíðini. Ein av hesum møguleikum er bylgjuorka, sum enn er óroynd her á landi, hóast møguleikarnir eru teir bestu til ein slíkan tørv.

- Vit hava helst tað størsta laboratoriumið til hetta í øllum Europa. Og eg meti avgjørt, at hetta átti at havt áhuga millum føroyingar nú og í framtíðini, sigur hann.

## Leita eftir skipasmiðju

**Ein onnur spennandi ætlan, sum er í umbúna á skúlanum, er ein serlig skipan við laminati til skipsskrokkar, og sum haraftrat setur størstu krøv til trygdina.**

**Á skúlanum hava tey fingið patent uppá hetta laminatið, men tað ið teimum vantar er einhvør fyritøka, ið hevur hug at royna hetta í veruleikanum.**

**- Vit leita í roynd og veru eftir eini skipasmiðju, ið hevur hug at kanna eftir, um hetta virkar í praksis, og ikki minst um tað kann nýtast til skrokkin á skipum og bátum sum sigla í tykkara baldruta farvatni, sigur Hans Jørgen Brodersen spentur á málinum.**

**Henda serliga skipanin við laminati skal roynast á landi, millum annað í vindmylluveingjum, men er uttan iva eisini væl hóskandi til bjargingarbátar og vanlig skip.**

**- Hetta átti tí at havt áhuga hjá føroyingum at granska nærri í, slær hann fast.**

### FAKTA

Lærdi Háskúlin í Ålborg byrjaði í 1974, men hevur í dag eina deild í Esbjerg og í Keypmannahavn.

Í 2006 vóru 14.185 lesandi, 2000 í starvi og við eini fíggjarætlan uppá 1,4 mia krónur.

Endamál teirra er í trimum – at undirvísa, granska og samstarva við vinnulívið.
Heimasíða teirra er www.aau.dk